# Vit koma í ringt orð

**- Hetta setir okkum í sera ringt orð úti í verðini, so hetta kann verða ein alvorligur trupulleiki fyri vinnuna, sigur stjórin í Samskipum**

VINNULÍV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*- Vinnumálaráðið hevur ligið sjóvarfallið av sær og tað er komið vinnuni í eina ógvuliga torføra støðu, sigur Joel undir Leitinum á Samskipum, sum eisini rekur frystigoymsluna, Kloosterboer í Kollafirði*

- Hetta er ein alvorligur trupulleiki fyri vinnuna.

Eisini Joel Undir Leitinum, stjóri í Samskipum, er harmur um støðuna, sum hevur tikið seg upp, nú Heilsufrøðiliga Starvsstovan ikki longur vil avgreiða skip, sum ES ikki hevur góðkent og sum vit greiða frá í greinini, sum nevnist: Vandi fyri at missa milliónir.

Hann sigur, at stórur vandi er fyri, at hetta fer at kosta vinnuni fleiri milliónir um árið.

Føroysku veitararnir mugu nú siga nei til skip, sum ætla sær at leggja upp og umskipa í Føroyum og tað frættist rættiliga skjótt úti í heimi.

- Marknaðurin er rættiliga opin og gjøgnumskygdur og av tí sama koma vit í rættiliga ringt orð úti í verðini og tað kunnu vit svíða fyri í langa tíð, sigur hann.

Hinvegin leggur hann afturat, at hann skilir væl Heilsufrøðiligu Starvsstovuna.

- Hon reagerar helst, sum hon kann undir hesum umstøðunum og tað er at nokta fyri at avgreiða skipini.

Joel undir Leitinum sigur, at tað, sum manglar, er, at vinnumálaráðið hevur forsømt at sett eina kunngerð í gildi, sum heimiðlar Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at seta tær neyðugu skipaninar í gildi.

Stjórin á Samskipum sigur, at tá ið boðini komu frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, gjørdi vinnan vart við seg. Men tey høvdu ikki væntað, at trupulleikin var so stórur og álvarsligur og tí høvdu tey væntað, at málið fór at verða loyst.

- Men nú nærkast vertíðin av álvara fyri, at hesi skipini skulu koma til Føroyar at leggja upp og tí er tað blivið meiri átrokandi at fáa trupulleikan loystan.

- Hetta er ein trupulleiki, sum vit hava vitað av í fleiri ár og eg haldi, at orsøkin til, at vit nú koma í hesa støðu, er, at vinnumálaráðið hevur ligið sjóvarfallið av sær ístaðin fyri at avgreiða málið í góðari tíð.

# Johan Dahl ætlar at klaga

**Við einum pennastroki hava Heilsufrøðiliga Starvsstovan og Vinnumálaráðið forkomið eini heilari vinnu í Føroyum og tað kann ikki bera til, heldur Johan Dahl, sum sjálvur verður hart raktur**

VINNULÍV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hetta kann ikki bera til. Hendir onki skjótt, er ein heilur vinnuvegur farin fyri skeytið.

Johan Dahl er ein av monnunum aftanfyri stóru frystigoymsluna í Vági og eisini teir eru hart raktir av, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan nú brádliga hevur gjørt av, at hon ikki longur vil avgreiða skip, sum ES ikki hevur góðkent og sum vit greiða frá í greinini sum nevnist: Vandi fyri at missa milliónir.

Johan Dahl sigur, at tað kann ikki bera til, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan skal sleppa at kvetta beinini undan eini heilari vinnu við einum pennastroki.

Hann sigur, at hann hevur spurt eftir, hvørja heimild, Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur at steðga virkseminum so brádliga, men enn hevur hann ikki fingið svar.

- Mín meting er, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur ikki heimild at taka eitt so ógvusligt stig og tí er tað vert at umhugsa møguleikan at krevja endurgjald fyri mista inntøku.

Hann heldur, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur rætt og slætt skyldu til at avgreiða skipini, sum koma.

Hann sigur, at tey hava roynt at kært avgerðina hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni fyri Vinnumálaráðnum.

- Men tann, sum viðgerð kæruna fyri Vinnumálaráðið, er ongin annar enn Peter Østergaard, sum eisini arbeiðir á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, hóast hann er virkandi landsdjóralækni.

Johan Dahl góðtekur ikki, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan soleiðis sleppur at viðgera kærir um seg sjálva og í øllum førum ætlar hann at kæra til Løgtingsins Umboðsmann, tí soleiðis hann ein almennur myndugleiki ikki bera seg at.

Hann sigur, at tað er óskiljandi, at myndugleikarnir ikki hava fingið hesi viðurskiftini í rættlag og sett skipanina í gildi, so at skipini kundu verðið avgreitt, sum vanligt.

- Sum støðan er nú er tað vinnan sum bløðir fyri, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan og Vinnumálaráðið ikki hava syrgt fyri at hava síni viðurskifti í ordan.

- Myndugleikarnir hava sovið í tímanum og tað kostar vinnuni milliónir, tí skipini sleppa ikki longur at leggja upp í Føroyum, men mugu sigla framvið og leggja helst upp í Niðurlondum ella onkrum øðrum ES landi.

Hann stúrir fyri, at er hesin marknaður fyrst dottin niðurfyri, verður tað ógvuliga stríggið at byggja hann uppaftur og tí kann talan vera um ein vinnnuveg, sum er mistur í allar ævir.

Johan leggur eisini dent á, at hann fekk onga fráboðan frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og at hann onki fekk at vita um málið, fyrrenn talan var um, at eitt skip skuldi koma fyri kortum, tí tað er ikki fyrrenn nú, at vertíðin byrjar av álvara.

Les eisini á síðu 7